

*Myndirnar á vegginum vitna um eitt langt lív og eina stóra familju. 80 ára gamla Julianna Didriksen vaks upp hjá ommu síni á Strondum, eftir at mamma hennara doyði. Sjálv gjørdist hon einkja, sum einans 24 ára gomul, og flutti tá til Havnar við dóttrini. Seinni fekk hon seks synir í slag*



*Julianna Didriksen er bindikonan í Havn. Fryntliga bindikonan er í sving alt árið við at binda konu- og mannfólkatroyggjur til føroyska búnan. Tað byrjaði við, at hon bant troyggjurnar til føroysku búnarnar hjá teimum sjey børnunum, sum hon so seldi, tá tey vóru vaksin úr teimum*

# ein mansaldur

Julianna Didriksen hevur ongantíð verið bangin fyri at royna nakað nýtt. Hon ynskti sær koyrikort, tí hon vildi sleppa at koyra hýruvogn, og tók hon tískil koyrikortið sum 44 ára gomul.

– Mann skuldi hava havt koyrikort í tvey ár áðrenn mann kundi sleppa at koyra hýruvogn, so eg mátti bíða í tvey ár, áðrenn eg fekk hýruvognsloyvi. Tá tað varð fingið í hús, koyrdi eg tey næstu í nógvu árini hýruvogn. Eina ferð krasjaði eg bilin, og tað var á verkstaðnum, at eg møtti mínum triðja manni, Davis. Hann átti verkstaðið, eg koyrdi bilin á, eftir eg hevði krasjað, og í ár eru 30 ár síðan vit bæði giftust. Hann var 43 og eg 50, sigur Julianna Didriksen við einum smíli.

Saman búgva tey í hugnaliga grannalagnum í Tórsbyrgi í Havn. Í gongini standa gamlar seymimaskinur á rað, og í einum kamari á ovaru hæddini standa tvær bindimaskinur. Ein til at binda konufólkatroyggjur og ein til at binda mannfólkatroyggjur. Hon hevur tvær maskinur, so hon sleppur undan at stilla tær inn av nýggjum hvørja ferð.

– Mannfólkatroyggjurnar bindi eg fyrst við gráum, og liti tær síðan bláar. Seinastu árini havi eg fingið alt meir at gera, og siti eg so gott sum árið runt og bindi troyggjur. Tað bara vindur upp á seg. Tað hevur ongantíð verið so nógv sum hetta seinasta árið. Fólk byrja at spyrja longu á ólavsøku frammanundan, og nú á jólum gjørdi eg fimm troyggjur, ið skuldu nýtast til jólagávur.

Sum er kann Julianna Didriksen sum pensionistur forvinna sær 58.000 krónur skattafrítt.

– Tað er gott afturat pensiónini, sigur hon.

## Beinini ov stutt

Gjøgnum árini hevur hon verið framúr virkin innan alskyns stuðulsarbeiði.

– Ja, eg havi sparkað fótbólt til frama fyri Javna, eg havi skipað fyri nógvum bingo spæli, og tað seinasta, eg eri farin at ganga upp í, er at spæla sjavs, sigur hon og peikar á glasskápið í køkinum, sum er fult við steypum.

– Tað byrjaði við at vinkonan Jana og eg fóru á sjavskapping umborð á Norrønu, og vunnu kappingina. Tey hildu, at vit snýttu og góvu tekin undir borðinum, men beinini hjá okkum eru so stutt, at tað hevði ikki latið seg gjørt, flennir Julianna.

Síðan hevur hon hildið fram við sjavsspælinum, og ætlar hon sær á næstu sjavskapping, sum verður umborð á Norrønu. Í fleiri ár hevur hon eisini verið fastur partur av shopping liðnum hjá verdóttrunum, ið á hvørjum ári leggja leiðina til Skotlands fyri at shoppa til jóla, og stendur hon tá einki aftan fyri yngra ættarliðið av kvinnum, ið elska at keypa. Í 30 ár á rað gjørdi hon sær biltúrar gjøgnum Onglands fyri at vitja familju har, men tað er ein farin tíð, nú Norrøna ikki longur siglir til Skotlands um summarið.

Hesa lítlu løtuna, vit stegða fyri at gera eitt prát við Julionnu og hennara gerandisdag sum pensionistur, setur hon seg nóg illa niðurat. Hon stákast, setir á borðið og tekur fram myndir av familjuni at vísa fram. Myndirnar á veggunum vitna um eitt langt lív og eina stóra familju. Hetta er heimið hjá Julionnu Didriksen, sum við mongu troyggjunum til føroyska búnan eisini er vorðið hennara arbeiðspláss.

– Nei, eg havi ongantíð angrað, at eg gavst at arbeiða, hóast mær dámdi væl á sjúkrahúsinum. Eg havi nokk at gera her, sigur hon glað.